**10 TING** UM

# Liza Marklund

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Krimidrotningin

SVENSKI RITHØVUNDIN **LIZA MARKLUND** SKRIVAR ALTJÓÐA **BESTSELJARAR**. HON BÝR Í SPANIA. OG NÚ SKULU **BØKUR** HJÁ HENNI **FILMATISERAST**

**1** Eva Elisabeth Marklund vaks upp í lítla býnum Pålmark har norðuri í Svøríki.

**2** 47 ára gamla Liza Marklund býr í Spania saman við manni sínum Mikael.

**3 Marklund er serliga kend fyri krimisøgurnar um Annika Bengtzon, sum eru týddar til 30 ymisk mál.**

**4** Seinastu bókina hevur Marklund skrivað saman við kenda amerikanska rithøvundanum James Patterson. Bókin kallast Postkortmordene.

**5** Hon hevur vunnið fleiri virðislønir fyri sín skaldskap – eitt nú Glaslykilin fyri bestu norðurlendsku krimibók í 1999.

**6** Liza eigur sjálv í útgávufelagnum Piratforlaget, sum gevur hennara bøkur út.

**7** Sambært Publishing Trends vóru bøkur hjá Marklund millum mest seldu bøkur í heiminum í 2002 og 2003.

**8 Tvær av bókunum um Annika Bengtzon eru gjørdar til film. Hesir vóru frumsýndir í 2001 og 2002.**

**9** Framleiðslufelagið Yellow Bird hevur keypt rættindini til at filmatisera seks av bókunum um Annika Bengtzon. Ætlanin er at fara undir filmsupptøkur seint í ár.

**10 Í 2004 gjørdist Liza umboðskvinna fyri UNICEF – ST-stovnin, sum arbeiðir fyri korunum hjá børnum.**

## SITAT



Vinur er hann, sum veit alt um teg, men framvegis dámar teg.

***Elbert Hubbard***

*amerikanskur heimsspekingur*

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos

## MIÐLARNIR OG EG



Kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.

JOURNALISTURIN **INGRID BJARNASTEIN** TEKUR EIN BACHELOR Í DONSKUM, HEVUR TÍ IKKI TÍÐ AT LESA TAÐ STÓRA, MEN TÁ TÍÐ ER, LESUR HON GJARNA EUROMAN OG LURTAR EFTIR U2.

**MÍTT BLAÐ**
Lesi ikki dagbløð í pappírsformi. Ella tað er í øllum førum sjáldan. Men lesi Politiken á netinum. Mítt forvitna lyndið ger, at eg eisini fari obligatoriska túrin inn á Ekstrablaðið. Føroysku bløðini verða sjáldan lisin, tí eg búgvi í Keypmannahavn og havi ikki hald til netútgávurnar.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Mín byrjanarsíða á netkaganum er dr.dk. Ein framúr góð síða. Bæði hvat tíðindum viðvíkur og annars eisini øðrum stuttligum, tankavekjandi og áhugaverdum ískoytum av øllum møguligum sløgum. Umframt politiken.dk og ekstrabladet.dk, sum eg nevndi í áðni, dámar mær til dømis annars væl at njósnast inni á trendsales.dk fyri at vita, um eg kann gera okkurt kupp.

**MÍN TÓNLEIKUR**
Dugi illa at definera mín tónleikastíl. Eri helst rættiliga mainstream. Sovorðið sum U2, Coldplay, Muse, Robbie Williams og Nephew slær ongantíð feil. Men mær dámar eisini væl eitt nú Eivør, Teit, Budam, Orku o.s.fr.

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Tíðartjóvurin Facebook og LinkedIn. Snúsi av og á til twitter, men dugi ikki at rokna tað út. Sama við Google Wave.

**MÍN DVD**
Havi bokssettið av bæði Friends og Sex & the City, og tað er sum oftast tað, ið eg vendi aftur til.

**MÍTT MAGASIN**
Haldi ikki nakað magasin. Eg havi lítið av tíð at lesa annað enn tað, ið er kravt til lesnaðin. Men av og á keypi eg onkuntíð onkur donsk magasin, sum t.d. IN, Eurowoman og líknandi. Mær dámar eisini ótrúliga væl Euroman. Góðar greinar og teirra E-matrix er fantastiskur. Og tá eg fái hendurnar á eitt Kvinnublað, verður tað eisini lisið.

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Eg kann altíð síggja ein part av Friends ella Sex & the City. Annars eru tað lættisoppasendingar sum reint undirhald. Kender du typen, Spise med Price, Greys Anatomy og líknandi.

**MÍN BÓK**



Sum við magasinunum, so havi eg lítið av tíð til at lesa bøkur, sum ikki hoyra til lesnaðin fyri tíðina. Tók fyri stuttum "Den som blinker er bange for døden" hjá Knud Romer niður av reolini. Men enn er hon ikki lisin. Mær dámar best fagrar bókmentir.

**MÍTT ÚTVARP**
Lurti ógvuliga sjáldan eftir útvarpi her í Keypmannahavn, sum jú er stórt spell, tá tilfeingið er so stórt. Oftast verður tað bara til tónleik. Men tá eg eri heima í Føroyum, er tað tíðindini eg hoyri - annars onki serligt...

**MÍN TELEFON**
Ein Nokia...

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Til dømis illa skrivaðar greinar, dokumentarar um 2. veraldarbardaga og hava-sendingar.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Uha, eg irriteri meg inn á nógv ting í miðlunum. Eitt nú havi eg eitt elski/hati-forhold til nógv ting. T.d. elski eg morgunsjónvarp og -útvarp, men samstundis kann tað irritera meg, hvussu lættisoppa tað er. Sum onkur segði, so hevði Hitler helst sloppið óskaladur ígjøgnum eina samrøðu í morgunsjónvarpi/útvarpi. Eg veit, at tað er helst ikki staðið, har eg skal vænta tær longu, djúpdaborandi samrøðurnar, men allíkavæl haldi eg ikki, at tað skal merkja, at tey sum eru við heilt skulu sleppa undan kritiskum spurningum, um samrøðan/evnið leggur upp til tað. Annars journalistiskt illa frágingið tilfar. Og tá journalisturin fær tilfarið at snúgva um seg sjálvan heldur enn persónin, hann tosar við ella evnið, hann viðgerð. Tá innihaldið er ein illa goymd lýsing fyri onkra stuttleikaferð ella okkurt produkt. Og ringar dagar nakað so banalt sum stavi- og kommafeilir.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Væl fortaldar søgur. Oftast eru søgurnar góðar, men tað knípur við at fáa tær fortaldar á rættan hátt. Meira fjølbroytt tilfar. Fleiri features og reportasjur. Í Kringvarpinum vantar okkum meira mentan ongin ivi um tað. Og kanska eisini eina føroyska undirhaldssending?